Mentamálaráðið
VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDIN

# SKRIVARI TIL VERKÆTLAN

**Ert tú góð/ur til at arbeiða sjálvstøðugt, dugir væl at samskipa, samskifta og skriva, so ert tú tann persónurin, sum vit leita eftir til verkætlanina – at endurskoða gymnasialu miðnáms-útbúgvingarnar.**

sansir.fo

Mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum og ágrýtnum skrivara at arbeiða fulla tíð. Starvið er tíðaravmarkað í 2 ár og verður sett skjótast til ber.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan er at vera skrivari hjá nevndini, sum er sett at endurskoða gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar og at samskipa arbeiðið í sambandi við íverksetan av nýggjari skipan saman við skúlunum. Skrivarin hevur harumframt til uppgávu at leggja til rættis og samskipa arbeiðið við støði í arbeiðssetninginum og samskipa lógararbeiðið, sum skal fremjast í sambandi við íverk-setan.

**Uppgávan fevnir m.a. um at:**
- fyrireika og samskipa arbeiðið í sambandi við fundir o.a.
- savna og skipa upplýsingar
- skriva og seta upp frágreiðing
- fyrireika lógararbeiði, t.e. tilevna uppskot til lógir og kunngerðir
- samskipa arbeiðið viðvíkjandi lesiætlanum
- standa fyri kunning og samskifti við skúlar og aðrar áhugabólkar

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar
- hava hægri útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og samstarva við nevndina og skúlarnar á økinum
- hava royndir innan verkætlanarleiðslu og íverksetan
- hava góðan málsligan kunnleika

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggja-rmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. og øðrum viðkomandi skjølum verður at senda til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða Mentamálaráðnum í hendi í sein-asta lagi tann 4. september 2006, kl. 16.00.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Eyðbjørn Poulsen, deildarstjóra á tlf. 35 50 75 ella á far-telefon 55 50 75.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
**Í aðalskrivstovuni eru** stápsfunksjónir innan m.a. løgfrøði, búskap, HR, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin í Mentamálaráðnum er býtt í 3 deildir – **Fólkaskúladeild, Vinnu-/ miðnámsskúladeild, og Mentamáladeild** – sum stápsfunksjónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.
**Økið hjá Vinnu- og miðnámsskúladeildini** fevnir um studentaskúlarnar, HF-skeiðini, handilsskúlarnar, teknisku skúlarnar, Fiskivinnuskúlan, Vinnuháskúlan, Klaksvíkar Sjómansskúla, Yrkisdepilin, KT-depilin og lærlingaútbúgvingar.

# Nýggi Dagstovnurin í Sørvági

## søkir eftir einum stuðulsfólki

Starvið snýr seg um eitt barn við fysiskum breki.

**Uppgávurnar eru m.a. at :**
- vera um og stimbra barnið í samspæl við onnur børn á stovninum
- stimbra fysisku førleikarnir hjá barninum
- fara við barninum til venjingar/fysioterapi o.a.

**Arbeiðstíðin:**
Er 40 tímar um vikuna. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar, ið hava útbúgving sum pedagogar og starvsfólk við líknandi royndum
hava fyrimun til starvið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Gitta av Kák leiðara á dagstovninum

**Løn og setanartreytir:**
Sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Í lønarflokki 3 til 8 fyri hjálparfólk og 11 til 18 fyri pedagogar.

Umsókn saman við útbúgving, royndum og møgu-ligum viðmælum, skulu sendast innan 15 august 2006 til :

**Nýggi Dagstovnurin**
**í Sørvági**
Att: Gitta av Kák
Varðagøta 8
Fo-380 Sørvágur
Viðmerkjast skal :
»umsókn til stuðul«



# Bilførari

Eitt starv sum bilførari á Viðarnesi er leyst at søkja skjótast til ber.

**Arbeiðsøki:**
Bilførari, koyra tangabil.

**Krøv:**
Stóra koyrikortið. Umsøkjarar við royndum hava fyrimun.

**Arbeiðsstað:**
Tórshavn.

**Løn:**
Smb. sáttmála við Havnar Arbeiðsmannafelag.

**Byrja:**
Skjótast til ber.

Meiri kann fáast at vita um starvið frá Andrias Jacobsen á tlf. 347400, lokal 430.

Shell

# *Frá Happadráttinum*



*Seinasti søludagur til 1. drátt er hósdagin 17. august 2006*

*Seðilin spælir við í 3. dráttum.*

*70% av søluvirðinum verður latið til vinningar*

*HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN*

## Frá Happadráttinum

Sagt verður frá, at frá 1. juli 2006 eru sølustøðini í Havn løgd saman í eitt sølustað.

Seljari er:
Irena Jacobsen
Fútalág 36
FO-100 Tórshavn

Tlf. 321 309 - fartlf. 212 309 - fax 320 656

# HANDILSLÆRLINGUR TIL THOMAS DAM ÍTRÓTT Í HAVN

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara í Havn at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann í dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og vi FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur.

Um tú ert tann rætti kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

Sosialurin 341800

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR · NIELS FINSENSGØTA 5
POSTSMOGA 268 · 110 TÓRSHAVN · TEL 35 53 00